# NORÐOYASTEVNUSKRÁ 2000

## Mikudagur 31. mai

| | |
|---|---|
| 20.00 | Norðoyastevnuteitið í Atlantis. Klaksvíkar Sjónleikarfelag skipar fyri. |
| 24.00-04.00 | Discoteque í Lognbrá. |

## Hósdagur 1. juni

| | |
|---|---|
| 16.00-20.00 | Norðoya Listafelag hevur framsýning í gamla Tekniska skúla. |
| 16.00- | Rulluskoytikapping eftir Klaksvíksvegnum. N.F.Í. / Helgi Laksafoss skipa fyri. |
| 17.00-18.00 | Norðoyastevnuteitið. Klaksvíkar Sjónleikarafelag skipar fyri. |
| 17.30- | Snarkapping í talvi fyri Børn og Ung í Skákinum á Akursmørk. Steyp verða latin. |
| 17.00-19.00 | Ponyríðing á økinum sunnan fyri Føroya Bjór. Norðoya Rossafelag skipar fyri. |
| 18.00- | Evangeliskt møti í Betesda. |
| 19.00-23.00 | Klaksvíkar Klubbi hevur opið. |
| 19.00-20.00 | Norðoyastevnuteitið. Klaksvíkar Sjónleikarafelag skipar fyri. |
| 20.30- | Snarkapping í talvi fyri vaksin í Skákinum á Akursmørk. Steyp verða latin. |

## Fríggjadagur, 2, juni

| | |
|---|---|
| 17.00-19.00 | Ponyríðing á økinum sunnan fyri Føroya Bjór. Norðoya Rossafelag skipar fyri. |
| 17.00-20.00 | Granskingarverkætlanin fyri Økismenning. Hølini opin fyri almenninginum. |
| 17.00-04.00 | Klaksvíkar Klubbi hevur opið. |
| 18.30- | Skrúðgongan byrjar á økinum niðan fyri Býráðshúsinum við Klaksvíkar Hornorkestur á odda. Skrúðgongan endar við svimjihøllina. |
| 19.00-20.00 | Fótbóltsdystur ímillum Klaksvíkar Býráð og samansett lið frá Runavíkar- og Nes og Gøtu Kommunu. ÍSB í Norðoyggjum skipar fyri. |
| 19.00- | Talvkapping fyri vaksin í Vágstúni ella í Skákinum á Akursmørk. Steyp verða latin. |
| 19.00-21.00 | Modelskip verða sýnd fram í Svimjuhøllini. RC felagið skipar fyri. |
| 19.00-22.00 | Norðoya Listafelag hevur framsýning í gamla Tekniska skúla. |
| 19.00-21.00 | Norðoya Fotofelag hevur framsýning í Kunningarstovuni. |
| 19.00-21.00 | KFUM & K-skótarnir skipa fyri KONDIBINGO. Byrjað verður uttan fyri KFUM & K. |
| 19.30- | Stevnan verður sett á Fótbóltsvøllinum av Jógvan við Keldu býráðsformanni. Klaksvíkar Hornorkestur spælir. |
| 20.00 | Ungdómsgudstænasta. Petur Hans Hansen syngur. |
| 20.00-21.30 | Kular røtur í K.Í. Høllini, Trøllapætur verður eisini við. |
| 20.00-23.00 | TIVOLI og útsølur við fótbóltsvøllin |
| 20.00-23.00 | KFUM skótarnir hava skjótibreyt við fótbóltsvøllin. |
| 20.00-23.00 | Café og matsøla í Bøgøtu 3. Klaksvíkar Húsmøðrafelag skipar fyri. |
| 20.00-23.00 | Rodeo mekaniskur hestur og hoppiborg við fótbóltsvøllin. NFÍ skipar fyri. |
| 21.00-23.00 | Fundur teirra ungu í Betesda. |
| 23.00-04.00 | Discoteque í LOGNBRÁ. |
| 23.00-04.00 | Dansur í Klaksvíkar Klubba. Martin vendur plátum. |
| 23.00- | Gamlamannadansur í KÍ-høllini. Harmonikuspælarar úr øllum Føroyum luttaka. Aldursmark 20 ár. KÍ skipar fyri. |

## Norðoyastevnuaftan, 3, juni

| | |
|---|---|
| 09.00- | Fótbóltur: KÍc-GÍb piltar 1/2 vøll |
| 09.00- | Fótbóltur: KÍa-GÍa smágentur 1/2 vøll |
| 09.40- | Fótbóltur: KÍa- GÍ a gentur 10-12 ár |
| 11.00-14.00 | Granskingarverkætlanin fyri Økismenning. Hølini opin fyri almenninginum. |
| 12.00- | Fótbóltur: KÍa-HBa piltar |
| 13.00- | Fótbóltur: KÍ-HBa 4 Deild landskappingardystur/steypadystur. |
| 12.00-13.30 | Føroya Bjór renningin byrjar. Runnið verður Skúlav.-Biskupstøðg.-Gerðagøta. Treysti skipar fyri. |
| 12.00 | Renning fyri børn 3 - 6 ár. Teinur eitt umfar |
| 12.20 | Renning fyri børn 7 - 12 ár. Teinur tvey umfør |
| 12.45 | Renning fyri vaksin 13 ár og eldri. Teinur 5 km. |
| 13.15 | Heiðursmerkjahandanin og lutakast ímillum rennarnar. |
| 13.30 | Súkklukapping fyri vaksin: Skúlav.-Gerðag.-Biskupstøðg. Byrjar/endar við Telefonstøðina. |
| 14.30 | Súkklukapping fyri børn: Skúlav.-Gerðag.-Biskupstøðg. Byrjar/endar við Telefonstøðina. |
| 14.30-23.30 | TIVOLI og útsølur við fótbóltsvøllin. |
| 14.30-23.30 | KFUM-skótarnir hava skjótibreyt við fótbóltsvøllin. |
| 14.00-21.00 | Norðoya Fotofelag hevur framsýning í Kunningarstovuni. |
| 14.30-23.30 | Rodeo mekaniskur hestur og hoppiborg við fótbóltsvøllin. NFÍ skipar fyri. |
| 15.00-16.15 | Fótbóltur: KÍa-VB dreingir |
| 15.00 | Kappróður: Beint eftir róðurin verða steypini handað í Klaksvíksgarðinum av Jógvan Lützen. Klaksvíkar Hornorkestur spælir. |
| 15.00-21.00 | Modelskip vera sýnd fram í Svimjihøllini. RC felagið skipar fyri. |
| 15.15- | Fótbóltur: KÍ b-SKÁLA Dreingir |
| 16.00-21.00 | Framsýningin ”Nátturan og Vit” við fimleikarahøllirnar (norðara enda). Stuðilsfelagið Dragin skipar fyri. |
| 16.00-21.00 | Skúlaskipið ”Dragin” hevur ”opið skip” við Varpabrúnna (sunnan fyri ferjuleguna). |
| 17.00-19.00 | Ponyríðing á økinum sunnan fyri Føroya Bjór. Norðoya Rossafelag skipar fyri. |
| 17.00-18.00 | Norðoyastevnuteitið í Atlantis. |
| 17.00-21.00 | Framsýning í hølunum hjá Norðoya Fornminnasavni. ”Føroyar Kristnar í 1000 ár, tekningar hjá J.P.Gregoriussen av kirkjunum í Føroyum. Kl. 17 spælir Piniartut (Fangarnir): Tellu Paulasto (Finland), sang, Anda Kuitse (Grønland), trummu og sang, Ville Kangas (Finland), fiól og Kristian Blak (Føroyar), klaver. NAPA í Grønlandi skipar fyri. |
| 17.00- | Café og matsøla í Bøgøtu 3. Kl. Húsmøðrafelag skipar fyri. |
| 18.00 | Mat & Køkutombola í fimleikarhøllini. Stuðulsgrunnurin „Dragin“ skipar fyri. |
| 18.00-20.00 | Fótbóltur: KÍ-HB 2. deild, landskappingardystur/steypadystur. |
| 18.00-22.00 | Norðoya Listafelag hevur framsýning í gamla Tekniska skúla. |
| 18.00-22.00 | Klaksvíkar Klubbi hevur opið. |
| 19.00 | Talvkapping ímillum Klaksvíkar Talvfelag og Tórshavnar Talvfelag í Skákinum á Akursmørk. |
| 19.00-20.00 | Norðoyastevnuteitið í Atlantis. |
| 19.00-22.00 | Eydnuhjól og Café í Skálanum. Bygdafelagið Sigursglæman skipar fyri. |
| 20.00-21.00 | Fólkafundur í Vágstúni um fullveldið. »Hesufer« skipar fyri. |
| 21.00 | Ungdómsmøti í KFUM & K. Gospelkórið VOX luttekur. |
| 21.00 | Samkoman í Betesda hevur útifund í Vágstúni. |
| 22.00- | Soli Deo Gloria hevur lovsongsløtu í Vágstúni. |
| 22.00-04.00 | Discoteque í LOGNBRÁ. |
| 23.00-23.30 | Klaksvíkar Sangfelag syngur í Vágstúni. |
| 23.30 | Klaksvíkar Hornorkestur spælir í Vágstúni. |
| 24.00 | Midnáttarsamkoma. Kyndlagonga kemur í Vágstún, har Hjalmar Waag Árnason Altingsmaður, flytur fram røðu. Aftaná verður fýrverkarí á Vágsbø og felagssangur. |
| 00.20-04.00 | Dansur í KÍ høllini. Orkestrið Taxi spælir. KÍ skipar fyri. |
| 00.30- | Føroyskur Dansur í Skálanum. Klaksvíkar Dansifelag skipar fyri. |
| 01.00-04.00 | Dansur í Klaksvíkar Klubba. Orkestrið ”Fluffy-Toys” spælir. |
| 01.00- | Musikkcafé við livandi tónleiki í KFUM & K. Gospelkórið VOX luttekur. |

## Norðoyastevnudag, 4. juni

| | |
|---|---|
| 10.00 | Betesdakórið syngur í Vágstúni. |
| 11.00 | Gudstænasta í Christianskirkjuni. Hans Eiler Hammer prestur, prædikar. |
| 12.30 | Sunnudagsskúli í Betesda. |
| 12.30-15.00 | Fótbóltur: KÍ-TB 3. deild menn landskappingardystur/steypadystur. |
| 14.00-04.00 | Klaksvíkar Klubbi hevur opið. |
| 14.00-14.30 | Kallakórið Keflavík syngur í Vágstúni. |
| 14.00 | Skrúðgonga við Klaksvíkar Hornorkestri, skótum og ítróttarfólki á odda, fer úr Klaksvíksgarðinum heim í Vágstún, har Andras Sólstein fyri Klaksvíkar Hornorkestur flytur fram røðu. Klaksvíkar Hornorkestur spælir. |
| 16.00-21.00 | Skúlaskipið “Dragin” hevur “opið skip” við Varpabrúnna (sunnan fyri ferjuleguna). |
| 15.00-24.00 | TIVOLI og útsølur við fótbóltsvøllin. |
| 15.00-24.00 | KFUM-skótarnir hava skjótibreyt við fótbóltsvøllin. |
| 15.00-23.00 | Café og matsøla í Bøgøtu 3. Kl. Húsmøðrafelag skipar fyri. |
| 15.00-24.00 | Rodeo mekaniskur hestur og hoppiborg við fótbóltsvøllin. NFÍ skipar fyri. |
| 15.00-17.00 | Fótbóltur: KÍ-Sumba 1. deild menn, landskapping/steypadystur. Í hálvleikinum hevur Klaksvíkar Fimleikafelag framsýning. |
| 15.00-22.00 | Norðoya Listafelag hevur framsýng í gamla Tekniska skúla. |
| 15.00-22.00 | Framsýningin ”Nátturan og Vit” við fimleikarahøllirnar (norðara enda). Stuðilsfelagið Dragin skipar fyri. |
| 15.00-21.00 | Modelskip vera sýnd fram í Svimjihøllini. RC felagið skipar fyri. |
| 16.00-22.00 | Eydnuhjól og Café í Skálanum. Bygdafelagið Sigursglæman skipar fyri. |
| 17.00-21.00 | Framsýning í hølunum hjá Norðoya Fornminnasavni. ”Føroyar kristnar í 1000 ár, tekningar hjá J.P. Gregoriussen av kirkjunum í Føroyum. |
| 17.00 | Møti í Soli Deo Gloria. |
| 17.00 | Norðoyastevnuteitið í Atlantis. |
| 17.00-19.00 | Ponyríðing á økinum sunnan fyri Føroya Bjór. Norðoya Rossafelag skipar fyri. |
| 18.00-20.00 | Fótbóltur: KÍ-B71 1. deild kvinnur. Landskapping/steypadystur. |
| 18.00 | Møti í Emmaus. |
| 19.00 | Evangeliskur sangfundur í Betesda við kórinum o.ø. |
| 19.00-20.00 | Norðoyastevnuteitið í Atlantis. |
| 20.00 | Møti í KFUM & K. |
| 21.00 | Samkoman í Betesda hevur útifund í Vágstúni. |
| 21.00 | Ungdómsmøti í Emmaus |
| 23.00-04.00 | Dansur í LOGNBRÁ. |
| 23.00-04.00 | Dansur í Klaksvíkar Klubba. Martin vendur plátum. |

## Mánadagin, 5. juni

| | |
|---|---|
| 13.00- | Fótbóltur: KÍc-GÍb pilar 1/2 vøll. |
| 13.00- | Fótbóltur: KÍb-ÍFb piltar 1/2 vøll. |
| 15.00- | Fótbóltur: KÍ-HB unglingar. |
| 17.00-21.00 | Framsýning í hølunum hjá Norðoya Fornminnasavni. ”Føroyar kristnar í 1000 ár, tekningar hjá J.P. Gregoriussen av kirkjunum í Føroyum”. |
| 19.00-21.00 | Norðoya Listafelag hevur framsýning í gamla Tekniska skúla. |
| 19.00-20.00 | Norðoyastevnuteitið í Atlantis. |
| 19.00-21.00 | Norðoya Fotofelag hevur framsýning í Kunningarstovuni. |
| 19.00-23.00 | Opið í Klaksvíkar Klubba. Okkurt verður til matnað. |
| 20.00- | Bønarmøti í Betesda. |

## Týsdagin, 06. juni

| | |
|---|---|
| 19.00-20.00 | Norðoyastevnuteitið í Atlantis. |
| 19.00-21.00 | Framsýning í hølunum hjá Norðoya Fornminnasavni. ” Føroyar kristnar í 1000 ár, tekningar hjá J.P. Gregoriussen av kirkjunum í Føroyum. |

*VÆLKOMIN Á NORÐOYASTEVNU!*

*Norðoya Frítíðar- og Ítróttarráð vilja við hesum ynskja øllum vælkomnum á Norðoyastevnu.*

**NORÐOYA FRÍTÍÐAR- OG ÍTRÓTTARRÁÐ**



**Landssjúkrahúsið**
FO-100 Tórshavn

## Yvirsjúkrasystrar

**Orsaka av at feilur var komin í fyrru lýsingina lýst leygardagin 27. mai 2000, verður við hesum lýst av nýggjum. Møguligir umsøkjarar verða bidnir um at síggja burtur frá fyrru lýsingini.**

**Nú avgerð er tikin um bygnaðin á Landssjúkrahúsinum verða við hesum 3 nýupprættaði størv sum yvirsjúkrasystrar lýst leys til setan sum skjótast aftaná at umsóknarfreistin er úti eftir nærri avtalu.**

**Felags fyri størvini:**
**Arbeiðsøki:**
Yvirsjúkrasystirin skal saman við leiðandi yvirlækna fyri øll starvsfólk, sum eru sett á deildini:

- Standa fyri starvsfólkaleiðslu og menning
- Seta mál fyri virkseminum á deildini
- Planleggja, samskipa og stýra arbeiðsgongdum, arbeiðstilrættaleggjan og tilfeingisnýtslu, soleiðis at veitt verður so munadygg tænasta til brúkararnar sum gjørligt, innanfyri teir til eina og hvørja tíð galdandi fíggjarkarmar
- Tryggja internt og eksternt samstarv og samskifti
- Tryggja neyðuga fakliga menning

**Førleikakrøv:**
Sjúkrasystraútbúgving og danska góðkenning.
Víðariútbúgving/eftirútbúgving innan sjúkrarøkt.
Útbúgving/royndir innan leiðslu og fyrisiting, helst á fleiri økjum innan sjúkrahús.
Kliniskar royndir innan avv. øki.
Hava góð leiðslu- og samstarvsevni.
Hava góð analytisk evni og vera framskygd/ur.
Vera sinnað/ur til framhaldandi at menna sín leiðsluførleika.
Hava hug og evni at starvast í eini deildarleiðslu, sum byggir á at avgerðir verða tiknar í samstarvsanda.

**Lønar- og setanarviðurskifti:**
Setanarmyndugleiki er sjúkrahúsleiðslan.
Næsti fyrisetti er leiðandi yvirlækni á deildini.
Starvið er áramálssett í 6 ár og kann leingjast eftir umsókn.
Setanin verður framd sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Sjúkrasystrafelag Føroya.

**Um deildirnar:**
**Skurðdeildin er:** Læknagongin, t.e. yvirlæknar, yngri læknar, skrivarar v.m., deildirnar: B5, A3, A2 harundir ljósmøður, Skurðgongin v.skaðastovuni, Endoscopideildin, Kirurgisk, Gynækologisk og Obstetrisk ambulatorium.

**Heiliráðdeildin er:** Læknagongin, t.e. yvirlæknar, yngri læknar, kostráðgevi, skrivarar v.m., deildirnar: B7, B6, B4, E2/E3, T.B. støðin, Onkologiskt ambulatorium, Diabetes Ambulatoriið.

**Psykiatrisk deild er:** Læknagongin, t.e. yvirlæknar, yngri læknar, skrivarar v.m., deildirnar: D1, D2, D3, D4, D5, D6, D7, Ambulatoriið, Bóndaheygur.

Tá skipanin er farin at virka, kann talan verða um at taka upp samráðingar fyri at víðka deildirnar til eisini at umfata aðrar ser/undirdeildir. Hetta skal fara fram í tøttum samstarvi ímillum sjúkrahúsleiðsluna, deildarleiðslurnar og avvarðandi deildarleiðara.

Nærri fæst at vita um størvini, starvslýsingar, frágreiðing um bygnaðin, við at venda sær til sjúkrahúsleiðsluna lokalnr. 251 ella 266.
Umsókn við avriti av prógvum v.m. skal stílast til sjúkrahúsleiðsluna og sendast til:

**Almanna- og heilsumálastýrið**
Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
100 Tórshavn.

Umsóknarfreist: 29. juni 2000. kl. 14.00.

## Kom og hoyr nærri um Kristnan Eftirskúla

Fylgjandi støð verður prædikað og upplýst um Evangeliskt Luthersk Missións eftirskúla:

**Hósdagin 1.6.**
Kl. 18.00 Møti í meinigheitshúsinum í Miðvági.

**Fríggjadag 2.6.**
Kl. 19.30 Møti í auluni á skúlanum í Vestmanna.
Kl. 20.00 møti í Meinigheitshúsinum í Tórshavn.

**Leygardagur 3.6.**
Kl. 20.00 Møti í Missiónshúsinum á Glyvrum.
Kl. 20.00 Møti í »Thabor«, Fuglafjørður.

**Sunnudagur 4.6.**
Kl. 11.00 Gudstænasta í Árnafirði.
Kl. 12.00 Gudstænasta í Kunoy.
Kl. 18.00 Møti í »Emmaus«, Klaksvík.
Kl. 20.00 Møti í KFUM/K, Klaksvík.

Fyristøðumaður Jens Dam og lærari, cand. theol. Knud Skov luttaka.

**Hedemølle Efterskole**

Evangelisk Luthersk Missions Efterskole
**DK-8850 Bjerringbro**
**Tlf. 0045 86685021**

www.hedemoelle.dk
E-mail: hedemoelle@hedemoelle.dk

## Hugnalig raðhús í Eysturbýnum til sølu

Fyri tað hóskandi boðið ber til at ogna sær eini vælhildin raðhús í Langatúni 10, matr. nr. 649 ah. Húsini eru í trimum hæddum, hvør 44,84 $m^2$, og eitt minni ovasta loft.

Á loftini eru trý kømur og baðirúm. Í miðhæddini eru stova, køkur og inngongd. Í kjallaranum eru kamar, kjallari og hjallur. Lítil havi vendur móti Bókbindaragøtu 23.

**Tygum kunnu fáa meira at vita á tlf. 312377**

## Bátaskrúva

V 17“x11 ynskist til keyps, ella í býti við eina H 17“x14.

**Tlf. 315046** ella **215046**

## Bilur til sølu

**VW Golf 1.9 Turbo Diesel**
Sera vælhildin, 5 hurðar, reyður, árg. feb. 98, km 52.000, eyka spoylara og alufelgur, cd-anlegg
**Kr. 150.000,-**

Pf. D. B. Bilar
J. Broncksgøta 15 · Tlf. 310600

## Avloysari fyri pedagog

Søkt verður eftir avloysara fyri pedagog í barnsburðarfarloyvi í tíðarskeiðinum frá 1. juli 2000 til 31. januar 2001.

Arbeiðsplássið er Sambýlið í Brúnagøtu 7 í Havn, sum er eitt sambýli fyri fólk við sálarligum trupulleikum. Sambýlið er nýstovnað og ætlanin er, at við ársenda skulu fýra fólk búgva har.

Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin hevur royndir í at arbeiða við fólki við sálarligum brekum.

Starvið er normerað til ein pedagog, men um eingin skikkaður pedagogur søkir, verður starvið sett við fólki við aðrari hóskandi útbúgving ella royndum.

Nærri fæst at vita um starvið við at tosa við Julionnu N. Foldbo á tlf. 321277, ella Bjarna Clementsen á tlf. 315426.

Umsóknarfreistin er 18.06.00.

Umsóknir skulu sendast til:

**Serstovnadeildina**
Sigmundargøtu 5
FO-100 Tórshavn

## Tímalærari/-ar til Føroya Handilsskúla, Tórshavn

Søkt verður eftir tímalærara/-um í

**støddfrøði B (10 t/v)**
og í
**samfelagsbúskapi B (6 t/v)**

at byrja á Handilsskúlanum 1. august 2000.

Umsøkjarar skulu hava prógv frá lærdum háskúla e.l., sum gevur førleika at undirvísa í lærugreinunum.

Umsókn skal skrivast á serligt oyðublað, sum fæst á handilsskúlanum. Meira fæst at vita við at venda sær til Føroya Handilsskúla, tlf. 317177.

Umsóknir við avritum av prógvskjølum og møguligum viðmælum skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi mánadagin 12. juni 2000.

Løn samb. HL sáttmálanum.

**Føroya Handilsskúli**
Postsmoga 177
110 Tórshavn

## Lastbilur við krana

Ford Tranist, diesel, byggiár 1988, lastar 1,1 tons, til sølu.

**P/F Vestmanna Timburhandil**
**Telefon 42 41 70 · Fax 42 44 27**